# Bókaútgávur

## Malju dámar at koyra

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út smábarnabókina Malju dámar at koyra eftir Lucy Cousins. Hetta er triðja bókin um heimsgitnu músina Maisy, sum á føroyskum eitur Malja. Áður eru komin stór klaffabók: Fyrsta klaffabókin hjá Malju og lítil sniðskorin bók: Malju dámar at spæla. Í hesari bókini, sum eisini er sniðskorin, ferðast Malja í ymiskum bilum og flogførum.

Bókin er 16 bls. í litum, prentað á haldgott papp og kostar kr. 40. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

## Tsatsiki og pápin

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út barnabókina Tsatsiki og pápin eftir Moni Nilsson-Brännstöm.

Tsatsiki og pápin er onnur bókin um Tsatsiki, sum er øgiliga spentur at hitta pápa sín, høggu-slokkafiskaran, sum býr í Grikkalandi. Og so gongur tað við rúkandi ferð, tí mamman og hann fara í summarfrí at vitja øll skyldfólkini. Har hittir Tsatsiki m.o. eitt systkinnabarn, sum er bæði djarvari og frekari enn nakar, hann hevur vitað um. Og so leggur hann til merkis, at gentur kunnu mussast, so at tú kennir tað heilt niður í tærnar - og at tú ongantíð kanst líta fult á nakran. Bergur Rasmussen týddi úr svenskum.

Tsatsiki og pápin er 146 bls., heft og kostar kr. 125. Bókin er umbrotin og prentað á Hestprent.

## Grát, mítt elskaða land

Forlagið Sprotin hevur givið út skaldsøguna Grát, mítt elskaða land eftir Alan Paton. Finnbogi Ísakson hevur týtt úr norskum. Skaldsøgan varð lisin upp í Útvarpi Føroya í 1988.

Skaldsøgan lýsir felags skuld og vinalag, sum hevjar seg upp um allar fordómar um suðurafrikanaran. Suðurafrikanski høvundurin Alan Paton, sum livdi frá 1903 til 1988, stovnaði Suðurafrikanska Frælsisflokkin. Flokkurin var í andstøðu til apartheit-politikkin og vísti á gongdar leiðir í suðurafrikanskum stjórnarpolitikki, sum ikki vóru grundaðar á rasistiskan hugburð.

# Jóna sýnir fram í Snarskivuni



FRAMSÝNING

Listakvinnan, Jóna Rasmussen, hevur latið upp listaframsýning á torginum í Snarskivuni hjá Tórshavnar býráð.

Jóna Rasmussen er sjálvlærd listakvinna. Hon hevur seinasta tíggjuáraskeiðið verið ógvuliga virkin og hevur arbeitt við bæði málningi og skulpturi, men lagt seg mest eftir grafikkinum. Jóna hevur tikið lut í nógvum framsýningum, einsamøll og saman við øðrum, bæði í Føroyum og uttanlands.

Á framsýningini í Snarskivuni, ið ber heitið: Svart og hvítt eru seytjan svart/hvítar grafiskar myndir. Íblásturin til sítt listarliga arbeiði fær Jóna úr mótsetningunum í gerandisdegnum, at hon er sjómanskona, sæst eisini aftur í myndevnunum. Allar myndirnar eru til sølu.

Framsýningin verður at síggja til fyrst í november mánað.

## MÁLBITIN

Tíðum hoyrist og sæst t.d. »yrking eftir Mikkjali á Ryggi«. Í hesum føri skal fyrisetingin eftir stýra hvønnfalli, og tað rætta er tí »yrking eftir Mikkjal á Ryggi«, »málningur eftir Jógvan Waagstein«. Summi nýta »av« í staðin, og tað skal ikki sigast at vera skeivt, men hugsið um merkingarmunin í hesum dømum: »mynd eftir Ingálv« og »mynd av Ingálvi«.

Eitt blað skrivaði, at »alt var í veitsluróma«, eigur at vera »…í veitslurómi«. Orðini rómur (av mannamáli) og rómi (á mjólk) eiga ikki at koma í bland. Hitt fyrra er sterkt bent og hitt seinna veikt bent orð. »Rómur í høll«, men »rómi oman á mjólk«.

*Orðafar nr. 1, 1986*

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Chanette á Lofti, chanettelofti@hotmail.com
Dagur 11.10.01
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Hevur »prísurin« ein prís?

Síðani eg kann minnast hevur mær dámað væl at tekna. Serliga hevur mær dámað væl at tekna andlit. Tað hevur ført við sær, at eg eisini havi fingið ein serligan áhuga í at eygleiða fólk og teirra andlitstrekk. Til dømis er tað áhugavert at finna ymisk gjøgnumgangandi trekk, sum eru sereyðkenni fyri ymiskar familjur ella ymisk fólkasløg í heiminum. Eg havi tí mest sum eina kapping koyrandi við meg sjálva, har eg royni at staðfesta hvaðani ein og hvør, sum eg møti á vegnum ella í tokinum man koma frá.

Fyri einum ári síðani fluttu maður mín og eg saman við báðum børnum okkara yvir um Oyrasundsbrúnna og avgjørdu at blíva sokallaðir »pendlarar« um sundið. »Gestsins eyga er gløgt«, sigur orðatakið og við míni vanligu tráan eftir at finna nøkur antropologisk sereyðkennir, legði eg skjótt merki til, at sviar hava eitt andlitstrekk, sum eg ikki var so kend við. Og sum fráleið sá eg, at fleiri høvdu hesi trekkini, so nú var eg vís í, at hetta var eitt serligt svenskt trekk. Yvirvørrin var eitt sindur útspílað og boygd niður móti vørrini, sum so var eitt sindur strømm og spent, og samstundis bleiv nøsin spílað upp og út. Hmm, eitt trekk sum eg ikki havi sæð síðani, eg seinast var í zoologiska hava.

Men ein gáta skal jú loysast, so eg fór at hugsa um, hvar hesi trekkini mundu stava frá. Tað nærmasta eg kundi koma til eitt svar var, at tað sikkurt vóru trekk sum stavaðu fra samunum í norður Svøríki. Hóast alt so var ikki nakað nevniverdugt av hesum trekkum at síggja í Danmark, og har eru heldir ongir samar. Samstundis líktist tað samum, sum eg havi sæð í sjónvarpinum. Og ein kann væl hugsa sær, at samar eisini hava sett síni spor í suður Svøríki, sjálvt um landið er líka langt sum frá Keypmannahavn og suður í Gibraltar. Gátan var loyst, og eg var líka nøgd, sum ein detektivur ið hevur fingið brotsmannin undir lás og slá.

MEN SO spurdi maður mín Ólavur meg ein dagin, um eg hevði lagt til merkis, hvussu nógvir svenskir menn snúsaðu?! SNÚSAÐU?!? Ja, hvat kann eg siga? Mínu sokallaðu samisku trekk vístu seg at vera SNÚS!! – Ein prísur undir yvirvørruni og einki annað.

Jú, nógvir menn snúsa í Skåne, og tí er tað kanska her, at Gøran Persson (svenski statsministarin) skal traðka inn og gera onkur politisk tiltøk ímóti snúsi fyri at fáa burðartalið upp í Svøríki. Hann hevur nevniliga heitt á svenskar kvinnur um at føða fleiri børn. Frammanundan hava svenskarar ein strangan roykipolitik, og tað er eisini ávíst, at royking hevur eina fysiologiska ávirkan á møguleikarnar hjá menniskjum at formera seg. Men hevur nakar hugsað um, at eitt yvirdrivið snúsforbrúk kanska førir til reint og skart avhaldni millum hjún? Eg vildi hildið, at har var nakað, sum átti at kannast nærri, tí tá eg ein dagin sá ein mann inni í Burger King fyrst fáa sær ein stóran prís undir vørrina og síðani fara í holt við at eta softice við karamellsós, so kann eg gott ímynda mær at »prísurin« kan hava ein størri prís í hjúnarbandinum, enn bara tað hann kostar við diskin. Tískilt má Gøran Persson týggja til góðan og gamlan snúsfornuft fyri at tryggja svensku arbeiðsmegina í framtíðini.




# SAMSKIPARI

Fyri eitt av stóru íttróttarfeløgunum í landinum, søkja vit eftir einum samskipara. Talan er um eitt nýtt starv, ið viðkomandi persónur sjálvur kemur at verða við til at byggja upp. Talan er um eitt fjølbroytt starv, ið m.a. inniheldur fylgjandi arbeiðsuppgávur:

**Høvuðsuppgávur:**
- Fyrireika og samskipa ymisk tiltøk, so sum stevnu, sølustevnu, lutaseðlasølu, v.m.
- Skaffa felagnum sponsorar og stuðlar
- Skaffa lýsingar til vøllin, leikskránna, v.m.

Umframt omanfyrinevndu uppgávur skal viðkomandi persónur eisini virka sum skrivari hjá starvsnevndini, og syrgja fyri neyðugum samskifti og neyðugari kunning innanhýsis sum uttanhýsis. Víðari verður talan eisini um vanligar umsitingarligar uppgávur.

Sum persónur ert tú fyrikomandi og hevur lætt við at samskifta við onnur. Tú kemur fyri tað mesta at arbeiða fyri teg sjálvan, og tí er neyðugt, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ikki ert bangin fyri avbjóðingum.

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 26. oktober 2001 til: **Virkisráðgeving Spf. Boks 26, 600 Saltangará**. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Dánial Petur Hansen ella Símun Hammer á Virkisráðgeving, tlf. 44 95 91. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo

ESVAGT-THOR

Søkt verður eftir
## Stýrimanni og dekkara
við royndum innan »Anchor Handling«

**Størvini:**
Eru umboð á standby og multipurpose skipi.

**Krøv og ábyrgd:**
Starvsfólkið fær ábyrgd av, at formligu reglurnar á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetning virkisins.

**Førleikakrøv:**

**Stýrimaður:**
- Vinnubræv sum skipsførarar/skiparar við STCW átekning II/2
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkileiðaraskeið
- GMDSS skeið
- ARPA skeið
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 góðskustýring (fyrimunur tó eingin treyt)
- Væl fyri í enskum, bæði í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri
- Kunnleika til D.P. útgerð (fyrimunur tó eingin treyt)

**Dekkari:**
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Væl fyri í enskum, bæði í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

**Løn og setanartreytir:**
Verða ásettar eftir avtalu.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til **P/S ESVAGT-THOR, 420 Hósvík,** skjótast tilber, ella í seinasta lagi 20.10.2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til **Gunnbjørn Joensen,** tlf. 422503.

P/S ESVAGT-THOR er eitt felag, sum í høvuðsheitum arbeiðir innan oljuvinnu, herundir trygd og umhvørvisvernd.
Meira sæst á heimasíðu okkara www.thor.fo

## Ungt fólk søkist

Ert tú virkin og til dystin fús? Kanska eitt sindur spælisjúkur eisini? So eru vit kanska nakað fyri teg.

Vit sóknast eftir einum ungum, ágrýtnum fólki, sum hevur áhuga fyri tøkni – eitt nú Play Station, telduspølum, fartelefonum, lummakalendarum o.s.fr.



Vit vænta, at tú ert lættur í lyndi, smílandi og fyrikomandi, og tær dámar at arbeiða.

Tú kemur í ein virknan hóp, og fyri tann rætta er talan um eitt framtíðararbeiði.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at tosa við Høgna á fløgudeildini, tel 353539.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

3arin ELECTRONIC

*att. Høgni Zachariassen*
*SMS · Postboks 1057 · FO-110 Tórshavn*

## NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið :

- Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
- Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
- Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
- Tórsh.-Vestm. kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254



## Skála kvøldskúli

bjóðar í vetur hesi skeið:

**TELDULÆRA:**
Týskvøld kl. 19.15.
Lærari: Jens M. Rasmussen, tlf. 442198.

**KVINNUFIMLEIKUR:**
Hóskvøld kl. 18.30. (Havið undirlag við).
Lærari: Guðrun M. Hansen, tlf. 441732 ella 211732.

**GUITARSPÆL:**
Tíð eftir avtalu.
Lærari: Esben Jacobsen, tlf. 441043 ella 254329.

Tilmelding kann eisini fara fram á tlf. 441539 ella á teldupostadressuni: skalask@post.olivant.fo . Tilmeldingarfreistin er leygardagin 20. oktober.

Luttøkugjaldið er 300 kr, sum verður goldið, tá byrjað verður.

Øll undirvísing fer fram í skúlanum, og byrjað verður í viku 43. Skeiðini eru treytað av nóg stórari luttøku.

**Skála kvøldskúli**

Lesið Sosialurin